# Skúlastýrisfundur nr. 1 í 2026

Stað: Skúlin á Argjahamri - Stórastova

Dato: 10.02.2026

Møtt á fundi:

Ása Chirstiansen, skúlastýrisforkvinna

Paula Neshamar Thomassen, foreldraumboð

Høgni Vilhelmsen, kommunustýrisumboð

Louisa Niclasen, læraraumboð

Marin S. Bláberg, skrivari

Mál á skrá:

| | |
|---|---|
| Fundardagar í 2026 | 1. 10 februar<br>2. 14. apríl<br>3. 12. mai<br>4. 8. september<br>5. 20. oktober (Fundur við næmingaráðini)<br>6. 17. november (Fundur við foreldraumboðini |
| Innskriving skúlaárið 2026/27 | Samanlagt eru 417 næmingar innskrivaðir í Skúlan á Argjahamri<br><br>22 í forskúla<br>379 í skúla (45 í 1. flokk)<br>16 í Ljósástovu<br><br>Skúlaøkir:<br>Uppskot um at gera Argir til eitt skúlaøki hevur verið frammi í kommununi. Uppskotið fall. |
| SSP ynskir, at vit gera ein nikotinpolitikk fyri skúlan | Skúlastýrið er samt um, at vit ynskja at vera ein rúsfríur skúli. |

| | |
|---|---|
| | Skúlastýrið mælir til, at SSP ger átøk fleiri ferðir um árið. Ynski er, at SSP upplýsir, hvussu farligt tað er at snúsa, roykja osv. |
| Næmingaráðið í Miðdeild hevur reist málið, at tey skulu fáa loyvi at keypa í skúlatíð. | Avgerð: Skúlastýrið hevur avgjørt, at næmingar í Miðdeild fáa ikki loyvi at keypa í skúltíð. Teir skulu halda seg innan skúlans øki. |
| Uttanlandsferðir | Skúlastýrið hevur viðgjørt málið um uttanlandsferðir.<br>Samykt varð, at skúlastýrið á komandi fundi skal gera eina meira greiða reglugerð.<br>Reglugerðin skal leggjast á heimasíðuna hjá skúlanum |
| Útiøkið | Kunnað varð um, at útbjóðingartilfar er gjørt klárt til basketvølllin og trivnaðarøkið vestanfyri skúlan |
| Eftirmeting av at stytta tímatalvuna serliga í hádeild. | Flest næmingar eru glaðir fyri, at tímatalvan er stytt. Skúlastýrið tekur undir við skúlanum, at tað er eitt gott hugskot at halda fram við stytta tímatalvuna. |
| Fundartíð: | 16.00-19.00 |